# Vit mugu tosa saman

**ntsbólkurin sendi í síðstu viku Anders Fogh Rasmussen bræv, har limirnir heittu á hann um at taka uppskotið um heimildarlógina viðvíkjandi Grønlandi aftur. Nú mugu føroyingar og grønlendingar tosa saman, sigur Kuupik Kleist**

HEIMILDARLÓGIN
*Marjun Dalsgaard*

Hóast at landstýrisformaðurin Hans Enoksen, úr grønlendska Javnaðarflokkinum, Siumut, hevur sagt, at landsstýrið ikki er sinnað at biðja Anders Fogh Rasmussen taka lógaruppskotið aftur, skrivaðu Lars-Emil Johansen úr Siumut og Kuupik Kleist úr Inuit Ataqatigiit úr Norðuratlantsbólkinum í síðstu viku undir eitt bræv, har teir heittu á Anders Fogh Rasmussen um at taka lógaruppskotið viðvíkjandi grønlendsku heimildarlógini aftur.

Kuupik Kleist vónar, at hetta grønlendska og føroyska samstarvi fer at fáa løgmann og landstýrisformannin at tosa saman.

– Tað er ikki so týdningarmikið, um brævið førir til kjak heima, møguliga vit fáa ein kuril á tráðin í mun til landsstýrið, men brævið kann vónandi føra til, at føroyingar og grønlendingar fara at tosa saman. Nú hava føroyski løgmaðurin og grønlendski landsstýrisformaðurin skrivað brøv til hvønn annan, og eg haldi, tað er tíð uppá, at teir byrja at tosa saman. Tosa vit saman, skal málið nokk loysa seg, tí eingin av okkum hevur nakran áhuga í, at hin parturin kemur at standa veikur, sigur Kuupik Kleist. Hann heldur ikki, at Lars-Emil Johansen og hann fáa stórar trupulleikar heima orsaka av hesum.

– Vit hava ikki tikið støðulin til sjálvt uppskotið aftur. Tað er mannagongdini vit mæla ímóti, sigur hann og leggur aftrat, at eftir hansara tykki er nakað spinnandi galið í eini samstarvi, har tríggir partar eru umfataðir av eini avtalu, sum bert tveir partar ynskja.

– Vit vóru tríggir partar í einum starvsbólki, føroyingar, danir og grønlendingar. So tóku føroyingar seg aftur, og uppskotið verður so langt fram ímóti teirra vilja, hóast at teir eru umfataðir av lógini - hetta er ikki vanlig demokratisk mannagongd, sigur Kuupik Kleist.

**Løgi at lógin skal viðgerast nú**

Hóast at grønlendska landsstýri stuðlar lógaruppskotinum, er Kupik Kleist ikki heilt sannførdur sjálvur.

– Eg havi mangan spurt forsætismálaráðharran, hví lógaruppskotið skal leggjast fram nú. Sum partur av samgonguni standi eg sjálvsagt aftanfyri innihaldið í hesum uppskotinum, men eg dugi als ikki at síggja, hví tað skal takast fram nú - hóast eg havi ein illgruna um hví, sigur hann.

Hann heldur, at danska stjórnin ynskir at lógarfesta á uttanríkisøkinum, áðrenn sjálvstýriskommisiónin er farin í holt við at viðgera tað.

– Grønlendingar eru í eini aðrari støðu enn føroyingar - vit arbeiða við eini sjálvstýriskommisión, sum væntandi hevur eina heilt nýggja heimastýrislóg klára um hálvt annað ár, tí kann tað tykjast løgi, at lógin skal viðgerast nú, sigur hann.

Um lógaruppskotið sigur Kuupik Kleist, at taðer betur enn einki, men ikki nóg gott.

– Vit hava tikið fyrvarni fyri, at heimildarlógin kann broytast, um hon stendir í vegin fyri tí, sum sjálvstýriskommisiónin kemur fram til. Haraftrat fáa vit hóast alt víðari rammur, enn vit hava havt við hesi lógini - tær eru møguliga ikki víðar nokk, men vit hava nokk ikki so markantar meiningar um evnið, sum flokkurin hjá Høgna Hoydal - og hann tykist nú hava sannført nógvar av hinum føroysku politisku flokkunum, sigur Kuupik Kleist.

Í brævinum til Anders Fogh Rasmussen verður sagt, at av tí at breið semja er millum føroysku politisku flokkarnar um at innihaldið í lógaruppskotinum ikki kann góðtakast, eins og limirnir í tingbólkinum halda framgongdina í málininum vera í stríð við vanliga demokratiska mannagongd, vilja teir tríggir fólkatingslimirnir heita á Fogh um at taka uppskotið aftur, til semja er funnin millum donsku stjórnina og føroyska landsstýrið.

Anders Fogh Rasmussen vil ikki siga nakað um málið, fyrr enn hann hevur svarað løgmanni.



*Føroyingar og grønlendingar mugu tosa saman um hetta málið, so finna vit eina loysn, tí eingin av okkum er áhugaður í, at hin parturin kemur at standa veikur, sigur Kuupik Kleist úr Norðuratlantsbólkinum*

SPEKT statsaut. revisorar

Correspondent Firm of KPMG International a Swiss Cooperation

Starvslýsing

## Stjóri til Búnaðargrunnin

Fyri Búnaðargrunnin verður søkt eftir stjóra.

**Um Búnaðargrunnin**
Búnaðargrunnurin varð stovnaður tann 1. januar 2005 og yvirtók í hesum sambandi ognir og virksemi hjá Jarðargrunninum og Grunninum fyri Vakstrarhús og Grønmetisframleiðslu. Virksemið hjá Búnaðargrunninum fevnir um útlán til landbúnað.

Búnaðargrunnurin verður umsitin av einum av landsstýrismanninum valdum stýri við 5 limum.

Í grunninum eru 4 starvsfólk.

**Starvið**
Talan er um eitt nýtt starv. Stjórin fær ábyrgdina av dagligu leiðsluni av Búnaðargrunninum við ávísing til stýrið.

Stjórin skal í neyvum samarbeiði við stýrið í Búnaðargrunninum, skipa fyri innanhýsis mannagongdum í sambandi við veitan av lánum og røkt av núverandi lánum.

Starvið er sambært lógini um Búnaðargrunnin tíðaravmarkað til 1. mai 2007.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

**Umsøkjarin**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:
- hevur leiðsluroyndir
- hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika til roknskap og fíggjarviðurskifti, umframt at verða vanur at arbeiði við teldu
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni
- dugir væl at málbera seg í skrift og talu.

**Umsóknir**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir, skal sendast til SPEKT statsaut. revisorar Sp/f, í seinasta lagi 1. apríl 2005.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Súna Schwartz Jacobsen á telefon 34 34 34.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Spekt statsaut. revisorar Sp/f
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Staravegur 1
Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefaks 34 34 35

Heiðavegur 15
Postboks 190
FO-600 Saltangará
Telefon 474 474
Telefaks 474 475

TEAM85